| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 23. februar 2017 |
| Býráðsfundur nr. | 03/2017 |
| Borgarstjóri | Sonni á Horni |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

Ár 2017 tann 23. februar kl. 19.00 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 17. februar 2017 um innkalling til fundar.

**Møtt vórðu:**

Sonni á Horni
Eivin Breiðaskarð
Kristian Petersen
Ólavur Larsen
Árant Berjastein
Magni Herason Jøkladal
Sigurð S. Simonsen
Eyðun á Lakjuni
Edva Jacobsen

**Skrivari:** Jákup Frants Larsen, kommunustjóri

**Mál nr. 07/2017.**

**Uppskot til broytan av byggisamtykt fyri Fuglafjarðar kommunu**

Tekniska nevndin hevur á fundi tann 14. februar 2017 viðgjørt mál um broytan av byggisamtykinini fyri kommununa, og mælir nevndin býráðnum til at gera niðanfyri standandi broytingar í byggisamtyktini fyri Fuglafjørð:

1.
Sethúsaøki/bústaðarøki "Øki B" á Vestara landi niðanfyri Toftanesveg verður víðka út til planeraða øki innannfyri, har Ísvirkið stóð, t.v.s. út til matr. nr. 882e.
Sambært galdandi byggisamtykti er økið útlagt sum havnarøki "Øki D".

2
Øki millum Toftagøru, Sýslumansgøtu, Kirkjuveg og oman til matr.. nr. 593a, sum sambært byggisamtyktina útlagt sum miðstaðarøki "Øki A" verður broytt til bústaðarøki "Øki B".
Á hesun øki verður loyvt at gera íbúðarbygningar við fleiri íbúðum.

3
Økið niðanfyri vestasta partin av Innandalsvegi frá mart nr. 185b og vestureftir verður broytt frá almennum frítíðarøki "Øki F" til búðstaðarøki "Øki B".

4
Økið, har goymslutunnlarnir eru og kunnu verða gjørdir verður frámert á kortskjali. Øki "L" tunnlar.

**Avgerð:**

Atkvøtt varð um hvørt av teimum 4 punktunum í tilmælinum sær. Punkt 1 varð samtykt. (9-0). Punkt 2 varð samtykt. (9-0). Punkt 3 varð samtykt. (7-2. Fyri atkvøddu Sonni á Horni, Eivin Breiðaskarð, Ólavur Larsen, Kristian Petersen, Edva Jacobsen, Magni Herason Jøkladal og Árant Berjastein. Ímóti atkvøddu Sigurð S. Simonsen og Eyðun á Lakjuni). Punkt 4 varð samtykt. (9-0).

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 21.00.

Eivin Breiðaskarð

Kristian Petersen

Árant Berjastein

Magni Herason Jøkladal

Eyðun á Lakjuni

Ólavur Larsen

Sigurð S. Simonsen

Edva Jacobsen

Sonni á Horni

Skrivari:

Jákup Frants Larsen